# Dansur, fólkalív og kirkja



*Sigmund í Hoyvík og biskupur Hans J. Joensen trína dansin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leygardagin var tiltak í Nor›urlanda-húsinum um føroyskan dans**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*

Leygardagin var tiltak í Nor›urlandahúsinum um føroyska dansin og fólkalív, kristinlív og kirkju.

Slái› Ring, 1000 ára haldi› og Landsbókasavni› skipa›u fyri.

Evni› var gamla føroyska mentanin, har føroysk kvæ›amentan og kristinlív livdu saman og tætt uppat hvørjum ø›rum.

Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur vi› mentamálum, setti stevnuna leygardagin. Á skránni vóru fyrilestrar. Ey›un Andreassen, professari, og Hans Jacob Joensen, biskupur, røddu um evni› : Kristindómur, kvæ›ayrking og dansur. Eftir fyrilestrarnar var› fari› upp á gólv. Gudbrandskvæ›i› ljóma›i og ver›ur har komi› inn á kristnibo›an í Noreg í fornum tí›um.

Eisini var í Nor›urlandahúsinum frams‡ning av handritum og kvæ›abókum. Á kvøldi› var› fari› upp á gólv í Ró›rarneystinum á Argjum.




# Eingin avger› um lei›sluna



*Marita Petersen*



*Ása Ellefsen*

SERNÁMSDEPILIN
*Ey›un Klakstein*

Fyri tveimum vikum sí›ani seg›i lei›slan á Sernámsdeplinum seg úr starvi.

Marita Petersen hevur veri› stjóri og Ása Ellefsen skúlalei›ari.

Tær søgdu orsøkina ver›a, at landsst‡risma›urin hev›i sátt iva um lei›sluna, og at eingi útlit vóru fyri, at vi›urskiftini á stovninum vóru fingin upp á pláss innan rímiliga tí›.

Marita Petersen og Ása Ellefsen fara bá›ar úr starvinum mi›skei›is í januar mána›i.

Tá ætlar landsst‡risma›urin í undirvísingar og mentamálum at seta eina n‡ggja lei›slu. Men hetta ver›ur bara ein fyribilslei›sla, tí landsst‡risma›urin ætlar onga endaliga avger› at taka um Sernámsdepilin fyrr enn nevndin, sum er sett at kanna stovnin, er li›ug vi› sítt arbei›i.

Torbjørn Jacobsen hevur ikki enn avgjørt, hvør skal hava lei›sluna á Sernámsdeplinum, tá núverandi lei›slan fer frá.



# Endalig avger› tikin um at bora í juni



*Sovereign Explorer kemur inn í føroyskum sjógv í juni næsta ár*

**Oljufeløgini skulu í seinasta lagi fríggjadagin hava lati› inn ætlanir sínar fyri komandi virksemi á føroyskum øki**

OLJULEITING
*Jan Müller*

St‡ringsbólkurin í Statoil-oljusamtakinum gjørdi á fundi í Havn nú um dagarnar endaliga av at fara undir sína fyrstu boring á føroyska landgrunninum einafer› í juni mána› næsta ár. Harvi› sta›festir st‡ringsbólkurin ta›, sum John Inderhaug, leitistjóri hjá Statoil seg›i vi› Sosialin í farna mána›. Ta› ver›ur boripallurin Sovereign Explorer, i› uttan iva ver›ur fyrsti boripallur í søguni, sum fer at bora á føroyska landgrunninum. Pallurin skal í apríl undir eina boriuppgávu vestan fyri Írland og kemur so í føroyskan sjógv í juni sigur John Inderhaug, sum í løtuni hevur ov miki› at taka til í sambandi vi›, at sokalla›a “Activity Plan” tvs. ætlanin fyri komandi virksemi hjá oljufeløgum, skal ver›a Oljumálast‡rinum í hendi í seinasta lagi 17. november.

Øll f‡ra feløgini í Atlantic Margin Group møttust í Havn herfyri. Tey eru umframt Statoil, Phillips, Veba og Enterprise. Vit spurdu John Inderhaug, um ta› er realistiskt at rokna vi›, at føroyskir veitarar kunnu vera klárir at bjó›a uppá uppgávur í sambandi vi› fyrstu boringina í juni. Hann sigur, at tí›in er sera avmarka›, men kortini heldur hann, at tey fara at megna hetta. Sosialurin skilur, at umbo› fyri oljufeløgini, sum hava fingi› loyvi at leita, hittust á fundi í Aberdeen í farnu viku. Tosa› ver›ur m.a. um, hvør skal standa á odda fyri hesum samarbei›i, og John Inderhaug vísir ikki aftur, at feløgini fara at b‡ta uppgávurnar millum sín.

Ta› eru annars serstakliga á f‡ra høvu›søkjum, har talan ver›ur um føroyska luttøku. Ta› er fyrst og fremst útger›arhavnin, harnæst flutningur vi› flogfari og tyrlu, sí›ani flutningur sjóvegis og at enda oljuverja. Talan ver›ur fyrst og fremst um eina prekvalifisering, tvs. at funni› ver›ur fram til, hvørji feløg hava møguleika at vera vi› og sí›ani ver›ur talan um eina veruliga útbjó›ing millum hesar fyritøkur.

Ta› ver›ur annars Rúni Hansen, serkønur í fíggjarmálum, sum kemur at standa á odda fyi leitiskrivstovuni hjá Statoil. Hann arbei›ir í dag á skrivstovuni hjá Statoil á Vi›anesi. John Inderhaug fer tó framhaldandi at standa fyri sjálvari leitingini. – Eg havi nú tikist vi› Føroyaøki› í skjótt fimm ár, og tá vit hava fingi› gongd á boringina og vónandi funni› olju vi› fyrstu boring fari eg helst undir a›rar uppgávur a›rasta›ni sigur hann.

Herfyri søkti Statoil eftir hølum til fleiri av starvsfólkum sínum. John Inderhaug sigur, at teir fingu nógvar fyrispurningar frá fólki, sum vildu leiga út. Teir hava so fingi› tær f‡ra íbú›irnar søkt var› eftir.

Eisini hjá BP hava tey søkt eftir íbú›um til nøkur av útlendsku starvsfólkum sínum. Hjarnar Djurhuus, stjóri sigur, at fólk ringdu alt fyri eitt eftir at teir l‡stu eftir sethúsum. Millum teirra eru eisini fólk, sum eru flutt av landinum og ikki hava vilja› selt húsini. BP er annars eisini klárt til 17. november at lata inn ætlaninar fyri komandi virksemi›.

## Oljufeløg fótin fastan

Sum partur av krøvunum til oljufeløgini er eisini, at opertørfeløgini skulu hava egna skrivstovu í Føroyum. Hini feløgini, sum eru í bólkunum, skulu haraftrat hava egnan filial, tvs. eina sokalla›a Føroyadeild, sum tekur sær av slíkum sum skattamálum ol. Oljumálast‡ri› krevur hetta av feløgunum fyri harvi› at tryggja sær, at feløgini hava fast rakstrarpláss í Føroyum. Harvi› ver›ur léttari hjá almennu skattaumsitingini at hava eftirlit vi› feløgunum og teirra virksemi. Hetta er so eisini ein orsøk til, at fleiri av feløgunum hava kjósa› sær advokatar sum teirra deildarlei›arar. Í blø›unum í hesum døgum ver›ur l‡st vi›, hvørjir persónar eru vornir lei›arara á føroysku deildunum hjá oljufeløgunum. Christian Andreassen er vor›in deildarlei›ari hjá felagnum Veba Oil.

# Føroyingar mugu standa saman

**– Ta› hevur gingi › ómetaliga skjótt frá tí, at semja var› gjørd um marki› - til fyrstu útbjó›ing og nú til leiting. Føroyskur ídna›ur má dubba seg, draga eina línu og arbei›a saman skal hann ver›a klárur til virksemi› komandi summar heldur Nigel Wicks, sum hevur eina rá›gevandi fyritøku í Noregi.**

FØROYSK LUTTØKA Í OLJUVINNU
*Jan Müller*



*Nigel Wicks slapp eisini at royna seg á sjónum, tá hann var vi› til Oljurá›stevnu*

Millum útlendsku luttakararnar á oljurá›stevnuni, sum Vinnuhúsi› skipa›i fyri í farna mána› var eisini Nigel Wicks, sum í dag arbei›ir sum rá›gevi í Noregi. Hann tekst vi› ymsa rá›geving innan frálandavinnuna. Nigel Wicks hevur heldur ikki ongan kunnleika til føroysk vi›urskifti og ynski hjá føroyingum at fáa eina oljuvinnu í gongd. Hann hevur nevniliga kunna› fylgt vi› gongdini í Føroyum seinastu árini, serliga sí›ani ONS í Stavanger fyri tveimum árum sí›ani, tá Ey›un Elttør, landsst‡risma›ur hitti bretska starvsfelagan John Battle. Tá var Nigel Wicks partur av bretsku sendinevndini. Hann hevur arbeitt í bretska uttanríkisrætnastuni í umlei› 20 ár og hevur í hesum sambandi havt rættiliga nógv vi› marknatrætuna millum Føroyar og Bretland at gera.

Nigel Wicks sigur seg hava roynt at fáa bretskan oljuídna› áhuga›an í gongdini í Føroyum og heldur sjálvur, at ta› hevur gingi› sera skjótt frá tí at føroyski og bretski oljumálará›harrin hittastu í Stavanger í 1998. -Tit hava bori› tykkum sera skjótt at at fáa eina útbjó›ing so skjótt eftir semjuna um marki› og so longu nú innan eitt ár kunna fara undie eina veruliga leiting.

Nigel Wicks heldur ta› gongur øgiliga skjótt, men vit fáa hann ikki til at siga, at ta› gongur ov skjótt. Hann er fyrrverandi diplomatur og veit tí, nær hann skal vera varin at úttala seg. Men Sosialurin fekk ta› burtur úr honum, at føroyingar hava nógv heimaarbei›i at gera, skulu vit megna at vera vi› í tí komandi útviklinginum og røkka øllum ætlanunum og ynskjunum.

– Men megna vit alt hetta?

– Ta› má vera upp til førysku oljuumsitingina at meta um. Eg kann hava mínar tankar, men fari at lata teir liggja her.

Nigel Wicks var vi› til alla rá›stevuna í Nor›urlandahúsinum og hann heldur hon var sera væl fyriskipa› og sera uppl‡sandi. Hetta sama søgdu øll hini útlendsku umbo›ini hann tosa›i vi›.

– Ta› er greitt, at ta› er nógv av arbei›i eftir til at fáa eitt gott samarbei›i millum operatørarnar og føroyskan ídna›. Hóast nógv er eftir at gera, trúgvi eg, at ta› vi› gó›um samstarvi ber til at røkka sínum málum.

– Men heldur tú veruliga at føroyski ídna›urin og samfelagi› ver›ur klár til at átaka sær stórvegis av uppgávum til komandi leiting?

– Ta› er torført hjá mær at svara, tí eg eri komin til Føroya fyri at læra. Eg havi tosa› vi› nógv fólk og skilji, at tingini eru gingin ótrúliga skjótt, og at her er nógv at fáa av skafti á›renn næsta summar.

– Heldur tú, at ídna›urin her er ov svangur og at ta› kann geva útlendsku oljufeløgunum fyrimunir?

– Eg haldi ikki ov svangur er rætta or›i›. Ta › er sjálvandi t‡dningarmiki›, at tit í Føroyum royna at halda saman og draga eina línu fyri at kunna vera vi› í hesum virkseminum.

– Hvussu heldur tú føroyingar kunnu fáa mest burtur úr komandi útviklinginum?

– Ta› er ta›, sum eg eri komin til Føroya fyri at kunna meg um. Í løtuni haldi eg ikki, at eg kann siga so nógv um ta›.

Uppá fyrispurning um ta› ikki hev›i veri› betri fyri Føroyar at bí›a› vi› boringini til 2002 ella bert at lati› eitt felag bora› næsta ár sigur Nigel Wicks, at hann helst vil sleppa undan at svara hesum.